Til
Føroya løgting
Tórshavn

Tórshavn, tann 22. november 2002

Fyrr í ár tóku peningastovnarnir í nýtslu eina nýggja gjaldsmidlingarskipan, sum verður nevnd GjaldSkipanin. Skipanin er ment í samstarvi millum Elektron og Pengeinstitutternes Betalings-Systemer (PBS), sum føroysku peningastovnarnir síðan 1971 hava verið partaeigarar í. GjaldSkipanin og samstarvið millum Elektron og PBS er fevnt av løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum og kunngerð frá 17. desember 2001 um flyting av persónsupplýsingum til útlond.

Hóast GjaldSkipanin er góðkend av Dátueftirlitinum, sum løgtingið sambært lógini hevur sett sum eftirlitsmyndugleika, hevur landsstýrismaðurin í lógarmálum seinni sætt iva um, hvørt samstarvið við PBS er í samsvari við lógina og kunngerðina. P/F Elektron og peningastovnarnir vilja hervið heita á Føroya løgting um at tryggja eina greiða lóggávu, so at tað á hesum øki verða skapt slíkir karmar, at Elektron ikki óneyðugt verður avmarkað í sínum møguleikum fyri at bjóða peningastovnunum - og føroyska almenninginum - so góðar og bíligar EDV-tænastur, sum gjørligt.

GjaldSkipanin

GjaldSkipanin er føroysk útgáva av BetalingsService hjá PBS, sum mangir føroyingar kenna. Hvønn mánað verða 5.000 flytingar avgreiddar úr Føroyum til danskar ognarar um Betalings-Service. Upphæddirnar verða skuldskrivaðar kontí í føroyskum peningastovnum, men gjaldsyvirlitið er higartil sent frá PBS í Danmark. Samstarvið millum Elektron og PBS ber í sær, at gjaldsyvirlitið verður útskrivað á Elektron, og at viðskiftafólk hjá peningastovnunum fáa eitt samlað yvirlit yvir uppkrøv frá donskum og føroyskum ognarum.

Við GjaldSkipanini fær skuldarin hvønn mánað eitt gjaldsyvirlit, ið vísir, nær og hvussu nógv kontoin verður skuldskrivað komandi mánaðin, til hvønn goldið verður, og hvat goldið verður fyri. Við GjaldSkipanini kunnu peningastovnarnir sostatt bjóða skuldarum eina nógv betri tænastu enn við V&T skipanini, ið higartil hevur verið nýtt til avgreiðslu av flytingum. V&T er ein einføld uppkrevjingarskipan, ið einans er lagað eftir tørvi ognarans. Skipanin bjóðar ikki skuldara so frægt sum yvirlit yvir fíggjarstøðuna.

Eisini ognarin fær munandi fleiri møguleikar við GjaldSkipanini enn við V&T skipanini. Ognarin fær møguleika fyri at skriva vanligar fakturaupplýsingar á gjaldsyvirlitið. Við GjaldSkipanini kann Elektron soleiðis standa fyri at senda út rokningar fyri ognarar - eisini sjálvt um inngjaldingin ikki verður sjálvvirkandi.

Samstarvið við PBS um menningina av eini føroyskari útgávu av BetalingsService hjá PBS, er eitt sera gott dømi um, hvussu Elektron við avmarkaðari orku kann bjóða føroyskum peningastovnum, og hervið eisini føroyska almenninginum, eina sera framkomna skipan. Uttan hendan samstarvsmøguleika hevði Elektron verið noytt til at brúkt sera nógva orku, fyri at kunna bjóða eina líknandi tænastu.

Hava fylgt lógini

Fyri Elektron og peningastovnarnar kennist tað tískil sera óheppið, at landsstýrismaðurin í lógarmálum nú sáar iva um, hvørt GjaldSkipanin og hervið samstarvið millum Elektron og PBS er lógligt.

Eftir metingini hjá Elektron og peningastovnunum er eingin ivi um, at GjaldSkipanin til fulnar lýkur endamálsgreinini í løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum. Lógin, ið hevur til endamáls at verja einstaka borgaran móti misnýtslu av persónsupplýsingum, hevur sum meginreglu í §16, at persónsupplýsingar skulu goymast og viðgerast í Føroyum. Lógin gevur tó møguleika fyri, at persónsupplýsingar eftir loyvi frá Dátueftirlitinum kunnu verða fluttir av landinum, um so er, at vissa fæst fyri, at upplýsingarnar í avvarðandi landi verða viðgjørdar á tryggan hátt.

Tað er neyvan ivi um, at PBS til fulnar lýkur øll hugsandi trygdarkrøv. Elektron hevur eisini fingið loyvi frá Dátueftirlitinum til at seta í verk GjaldSkipanina í samstarvi við PBS. PBS tekur sær annars av FR-kortinum, sum verður brúkt til 4 - 5 mió. elektroniskar flytingar um árið. Meðan FR-kortið hevur ta fyritreyt, at upplýsingar um navn, bústað, mynd og undirskrift hjá kortánara verða goymd uttanlands, so hevur GjaldSkipanin einans ta fyritreyt, at eitt uppspunnið skuldaranummar og kontonummar verða skrásett uttanlands. Upplýsingar um navn skuldarans og saldo á konto verða einans skrásettar á Elektron.

Ein ivasom kunngerð

Hevur landsstýrismaðurin rætt í tí, at GjaldSkipanin ikki er lóglig, so er FR-kortið enn minni lógligt. Tað er torført at meta um tær avleiðingar, sum tulkingin hjá landsstýrismanninum av lógini, kundi fingið fyri føroysku peningastovnarnar. Ein røð av altjóða gjaldsmidlingarskipanum, sum allar krevja skifting av munandi fleiri upplýsingum enn GjaldSkipanin, høvdu staðið fyri falli. Føroyar høvdu verið í ferð við at taka seg úr altjóða samfelagnum á hesum øki.

Við orðingini av §§16 og 17 í lóg um persónsupplýsingar og teirri heimild, sum løgtingið hevur givið Dátueftirlitinum til at geva undantaksloyvi frá meginregluni, tá ið hetta fer fram á tryggan hátt, tykist tað, sum neyðugur smidleiki er bygdur inn í lógina. Tá ið lógin varð broytt í fjør, fall tann ógvuliga víðfevnda ásetingin í §17, 4. stykki í lógaruppskotinum burtur. Hon ásetti, at EDV-skrár, sum eru umfataðar av lógini um persónsupplýsingar, skulu goymast og viðgerast í Føroyum, uttan so at landsstýrismaðurin í hvørjum einstøkum føri gevur undantaksloyvi.

Í §17, 3. stykki í lógini er ásett, at landsstýrismaðurin kann áseta reglur um flutning av persónsupplýsingum til útlond. Hesa heimild hevur landsstýrismaðurin nýtt til at seta í verk kunngerð um flutning av persónsupplýsingum til útlond. Í kunngerðini er ásett, at *elektroniskar* dátuskipanir, ið nýta elektroniska dátuviðgerð av persónsupplýsingum umfataðar av løgtingslóg um viðgerð av persónsupplýsingum, *ikki* kunnu flytast av landinum. Tað kann vera líkt til, at landsstýrismaðurin við hesi kunngerð hevur tikið sær júst ta heimild, sum løgtingið hevði tikið frá honum við at strika §17, 4. stykki.

Ein kunngerð um Elektron?

Tað má vekja undran, um landsstýrismaðurin, ið hevur heimild til at áseta nærri reglur fyri, *hvussu* flyting av persónsupplýsingum til útheimin kann gerast, hevur roynt at nýta hesa heimild til at steðga einari ávísari verkætlan hjá einari ávísari fyritøku. Tí vera kann orðalagið í kunngerðini benda á, at júst hetta var endamálið, og seinni viðmerkingar hjá landsstýrismanninum styrkja hesa ábending.

Landsstýrismaðurin hevur sett sær fyri at steðga GjaldSkipanini við nýggjari kunngerð. Tað kann ikki vera rætt. Tað má verða leiðslan hjá Elektron - og ikki landsstýrismaðurin - ið innan lógarinnar karmar ger av, hvar og hvussu ítøkiligar verkætlanir skulu mennast.

Landsstýrismaðurin ger galdandi, at samstarvið millum Elektron og PBS um GjaldSkipanina, sum Elektron, peningastovnarnir og Dátueftirlitið meta vera lógliga, ikki samsvarar við *politiska* viljan.

Elektron vil ikki verjast

Elektron og peningastovnarnir venda sær ímóti tí hugburði, ið landsstýrismaðurin hevur sýnt í hesum máli. Skulu peningastovnarnir kunna bjóða sínum viðskiftafólki eina tíðarhóskandi tænastu, og hetta fyri ein prís, ið viðskiftafólkini kunnu og vilja rinda, er avgerandi, at Elektron kann luttaka í altjóða samstarvi við aðrar EDV-fyritøkur. Eitt tílíkt samstarv er treytað av, at persónsupplýsingar kunnu sendast um landamørk, men sjálvandi á tryggan hátt.

Fyri Elektron kennist hetta, sum um landsstýrismaðurin yvirtulkar lógina, og í misskiltari umsorgan fyri Elektron roynir at nýta lógina til at avbyrgja Elektron frá útheiminum. Elektron vil ikki hava slíka verju. Skal Elektron yvirliva og mennast, er tað ein fyritreyt, at Elektron luttekur í altjóða samstarvi við aðrar dátufyritøkur. Annars fer Elektron at víkna. Fyritøkan verður afturúrsigld og fer ikki at vera før fyri at bjóða peningastovnunum tíðarhóskandi og kappingarførar tænastuveitingar.

Elektron og peningastovnarnir heita staðiliga á Føroya løgting um ikki at virka fyri eini herðing av lógini um viðgerð av persónsupplýsingum, og vit heita á løgtingið um at virka fyri, at lógin ikki umsitingarliga verður brúkt til at røkka øðrum málum, enn júst at verja persónligu dátutrygdina.

Við hávirðing

P/F ELEKTRON PENINGASTOVNARNIR